# TILTØK

**Missiónsvikan í Porkeri**
heldur fram:
Leygarkvøldið tann 12. kl 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari. Streingjakóri› á Tvøroyri syngur.
Sunnukvøldið tann 13. kl 18 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari. Streingjakórið í Porkeri syngur.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Betania, Sumba**
Møti verður leygarkvøldið og sunnukvøldið kl. 20, Jens Magnus Jensen og Essa Petersen tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroysk møtir í Danmark**
***Sønderborg:*** Leygarkvøldið 12. januar, verður Evangeliskt møti á Skolehjemmet, Søndre Landevej 28. kl. 19,00 og Sunnudagin 13. januar kl. 10 verður Breyðbróting.
***Vejle:*** Sunnudagin 13. januar kl. 16,00, verður Breyðbróting og beint aftaná kl. 17 verður Frelsens Hær, Staldgårdsgade 4. Talarar og við á ferðini verða: Elsa og Poul Johan Djurhuus, M. C. Restorff og fleiri.
Góður sangur og tónleikur, við M. C. Restorff, Hans Jákup á Lava, við fleiri.
Aftaná øll møtini bjóða vit ein góðan drekkamunn og okkurt munngott afturvið.
Hjartaliga vælkomin at oyra orð Harrans á móðurmálinum.

**Stovna Føroya Felag í Stóra Bretlandi**
Stig eru tikin til at stovna Foroya Felag í Stóra Bretlandi. Stovnandi aðalfundur verður i hølunum hja donsku kirkjuni i London 2. februar 2008 kl. 16. Adressan hja donsku kirkjuni er: 4 St. Katherine's Precinct, Regent's Park, London NW1 4HH. Eftir aðalfundin verdur buffet @ 12£. Vinarliga boða fra luttøku áðrenn 25. januar til: ottar@foroyar.org.uk

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur 14. januar***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
11.00 - 11.45 Enskt talumál
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
***Mikudagin 16. jan. kl. 15.00 vitja vit kirkjuna í Hoyvík. Vit hittast í kirkjuni. Tilmelding: 316491***
***Týsdagur 15. januar***
09.00 - 10.30 Skanning (lítið royndir brúkarar)P.Poulsen
10.30 – 12.00 Skanning (royndir brúkarar ) Páll Poulsen
10.00 – 11.30 Vit syngja Knút Olsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
***Almennur politiskur valfundur.***
***Orðstýrari: Anna V. Ellingsgaard***
***Øll eru hjartaliga vælkomin***
***Mikudagur 16. januar***
09.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grethu Harlou
12.00 Døgurði
***15.00 Túrur: Vitja kirkjuna í Hoyvík. Hittast í kirkjuni í Hoyvík. Tilmelding: 316491***
***Hósdagur 17. januar***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa: Í havsins hjarta" Gunnar Hoydal, hittast í dag
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 18. januar***
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grerhu Harlou
12.00 Døgurði
13.30 – 17.00 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00. Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 14. jan.***
Spurnarkapping.
***Mikudagin 16. jan.***
Upplestur, vit lurta eftir eini upplisnari søgu.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
***Klaksvíksvegur 35***
***Klaksvík · tlf. 459091***
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

almannastovan
www.almannastovan.fo

Á Almannastovuni starvast 100 starvsfólk. Á Veitingardeildini starvast 9 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari.



*Fyribilsstarv sum*
**MÁLSVIÐGERI**
**á Almannastovuni**

Hevur tú hug á royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning? so er eitt fyribilsstarv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni leyst at seta skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda tær til Tummas Djurhuus, deildarleiðara, á tel 353510, ella á portal.fo og almannastovan.fo

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:
Almannastovuna, Smyrilsveg 20
Postsmoga 3096, 110 Tórshavn
í seinasta lagi 28. januar 2008, kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan "Veitingardeildin".

KREA

www.fds.fo

Stjóri til P/F FDS

P/F FDS sóknast eftir stjóra at byrja skjótast til ber.

**P/F FDS**
er eitt partafelag, ið hevur sum endamál at umsita kort- og náttúrudátaskráir og at veita tænastur til myndugleikar og almenning. Tað eru SEV, Føroya Tele, Vinnumálaráðið umboðað av Landsverk og Umhvørvisstovuni (fyrr Matrikulstovuni), Klaksvíkar- og Tórshavnar kommuna, ið eru parteigarar í felagnum.

**Starvsøkið**
Sum stjóri í felagnum kemur tú at taka tær av dagligu leiðsluni eins og tú saman við nevndini setur út í kortið yvirskipaði mál og virksemi innan digitala kortgerð og lendislýsing. Stjórin skal menna felagið og annars at fylgja við tíðini og teimum avbjóðingum, ið eru innan digitala kortviðgerð og lendislýsing millum annað á handilsligum grundarlagi.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum virkisfúsum stjóra, ið torir at taka við avbjóðingum og sum hevur útbúgving og góðar leiðsluroyndir innan dátufrøði, rokniskap/fíggjarstýring ella handil/vinnu og dugir at arbeiða við digitalari kortviðgerð sum heild. Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur vitan innan dátugrunnar og GIS umframt ymsar webtænastur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært nærri avtalu. Sáttmálin millum fíggjarmálaráðið og avvarndi yrkisfelag verður nýtt sum grundarlag

**Umsókn**
saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera nevndini í P/F FDS, Tinghúsvegur 9, Tórshavn í hendi í seinasta lagi 25. januar 2008.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til nevndarformannin Boða Haraldson á tlf 302010.

Tinghúsvegur 9 · Postboks 233 · 110 Tórshavn · Tel 31 62 00 · post@fds.fo



ANNFINN BREKKSTEIN
www.brekkstein.com
X B